# ki um aldur



*Gamal í skinni, men ungur í sinni, verður sagt. Og tað kunnu vit siga um Shakin´ Stevens, sum hóast sín heldur høga aldur (til eina popstjørnu í øllum førum) framvegis hevur orku til stórar konsertir*

- So tað er framvegis ein marknaður fyri mínum tónleiki, slær Shaky fast.

Men hann er ikki bilsin av, at hansara tónleikur framvegis selur.

- Eg má vekja ein sovandi lurtaraskarða, tá eg gevi fløgur út. Vit nýta nógv sjónvarpslýsingar, tá eg sendi nýtt tilfar á marknaðin, og tað riggar sum oftast sera væl. So um eg skal røkka mínum lurtarum, so má eg lýsa gjøgnum sjónvarpið, greiðir Shakin´ Stevens frá.

## Lívið sum stjørna

Hóast lívið hjá Micheal Barrat ikki hevur somu ferðina sum í fyri tjúgu árum síðani, kann hann greiða eitt sindur frá, hvussu hann hevur upplivað tíðarskeiðið, tá hann livdi dreymin sum stjørna.

- Tað er nógv, sum gleppur einum av hondum, tá lívið gongur við rúkandi ferð, sum tað gjørdi hjá mær, sigur Shaky. Tað eru serliga tey persónligu sambondini, sum fara fyri bakka, og tað er nakað, sum eg sakni. Lívið gekk frá hotelli til hotel, frá einum palli til tann næsta, og eg fekk ikki sitið í frið á einari matstovu, tá eg bara vildi taka mær av løttum.

- Tú sært heldur ikki nøkur av teimum nærmastu gerast vaksin og tílíkt. Men tað er farið. Vit hava øll ymsar arbeiðstíðir, sigur hann.

Spurdur um hann angrar nakað, er svarið játtandi.

- Eg angri ávís viðurskifti her í lívinum. Eitt nú var pápi mín ikki til staðar, tá mín yrkisleið fekk vind í seglini, men tað fái eg ikki broytt.

Micheal Barrat spældi í bólkinum Shakin´ Stevens and The Sunsets í sekstiárunum, og í 69 gjørdust teir yrkistónleikarar. Tey fyrstu nógvu árini spældu teir á smáum klubbum og fyri ungum lesandi. Í 1972 varð bólkurin kosin besti live-bólkur í einari atkvøðugreiðslu millum tónleikaáhugað.

Shakin´ Stevens byrjaði sína solo-karrieru í 1977, og trý ár seinni fekk hann sítt gjøgnumbrot við lagnum Hot Dog.

Vit vita, at tað kann vera sera torført hjá evnaríkum tónleikarum at fáa eitt gjøgnumbrot á altjóða tónleikapallinum. Men hvussu upplivdi Shakin´ Stevens tíðina undan sínum gjøgnumbroti.

- Tað er torført, sera torført. Tú mást ongantíð fella í fátt. Eg var heppin við timing og teimum sambondum innan tónleikaheimin, sum eg hevði. Tað hevur alt at siga í veruleikanum.

- Tá eg var ungur, gingu plátufeløgini ikki runt í Cardiff og leitaðu eftir sangarum sum mær. Eg var heppin, tí í dag eru møguleikarnir hjá nýggjum bólkum og einstaklingum munandi betraðir samanborið við mínar ungdómsdagar.

## Orkan bilar ikki

Gamal í skinni, men ungur í sinni, verður sagt. Og tað kunnu vit siga um Shakin´ Stevens, sum hóast sín heldur høga aldur (til eina popstjørnu í øllum førum) framvegis hevur orku til stórar konsertir.

- Sóu tit ikki ein ungan mann á pallinum í kvøld. Eingin er ov gamal til rock n´ roll. Man er so ungur, sum man sær út, og eg síggi rættiliga ungur út, svarar hann flennandi.

Tá vit nema við framtíðarvónirnar hjá Shakin´ Stevens, so kunnu vit gleða okkum til nýtt tilfar. Hann greiðir frá, at nýtt tilfar er á veg, og hann roknar við at fara í upptøkuhølini um ikki so langa tíð.

- Mínir lurtarar hava uppiborið nýtt tilfar, og tað havi eg sjálvur eisini, sigur hann við einum smíli.

## Vágsbøur bíðar

Leygarkvøldið 6. august verður Shakin´ Stevens at síggja á palli á Summarfestivalinum í Klaksvík, og Shaky gleðir seg til at vitja Føroyar.

- Eg havi ongantíð verið har áður, men eg havi hoyrt, at tað er eitt sera vakurt stað, vit skulu vitja, og tí gleði eg meg til at vitja í Føroyum. Eg má tó fara at lesa eitt sindur uppá, áðrenn eg komi til oyggjarnar, so at eg kenni til viðurskiftini har, sigur Shaky.

- Tað er altíð ein avbjóðing at framføra fyri einum nýggjum skara av fólki, sum allarhelst ongantíð hevur hoyrt meg live fyrr.

Vit kunnu tí vænta at síggja ein væl upplagdan Shakin´ Stevens á palli í Klaksvík, har hann fer at framføra allar tær væl kendu landaplágurnar frá áttatiárunum.

# Shaky fekk platin

SHAKIN´ STEVENS
*Stefan í Skorini*

Undir konsertini fekk Shakin´ Stevens handað donsku platinvirðislønina, sum verður givin fyri góð sølutøl. Hetta var bert ein av mongum slíkum virðislønum hjá Shakin´ Stevens, sum hevur fingið eitt ótal av platin, gull og dupultun platin virðislønum gjøgnum árini, umframt at hann hevur selt milliónir av LP-um og stakfløgum.

Tað var ein vælklæddur umboðsmaður frá Tivoli, sum kom inn á pallin undir konsertini og handaði Shakin´ Stevens donsku platinvirðislønina, nú tónleika-fløgan og DVD útgávan hava rokkið teimum 40.000 eintøkunum.

Umframt platin í Danmark hevur Shakin´ Stevens júst fingið gullvirðislønina í Bretlandi, har hann seldi 100.000 eintøk í átta dagar.



John Christoffersen, promotari:

# Loyndarmálið er at gevast á toppinum

SHAKIN´ STEVENS
*Stefan í Skorini*

Shakin´ Stevens er sera væl umtóktur í Norðurlondum, og tað var í Danmark, at hansara síðsta savnsfløga fyrst varð givin út. John Christoffersen tekur sær av Shakin´ Stevens í Norðurlondum.

- Eg eri í veruleikanum ikki serliga bilsin av, at Shakin´ Stevens framvegis selur fløgur í stríðum streymum. Hann var nevniliga so framsíggin, at hann gavst, meðan hann enn var á tindinum, tá hann framvegis kundi fylla stórar hallir og savna stórar mannfjøldir til sínar konsertir, sigur John Christoffersen.

- Nógvir tónleikarar spæla fyri stórum fjøldum, men so fjarðar undirtøkan so spakuliga út, og teir enda við at spæla á heilt smáum støðum. Men av tí at Shaky steðgaði á toppinum, kann hann trína aftur á tónleikapallin eftir langan steðg, og fólk streyma til konsertirnar.

Men hvat er tað nágreiniliga, sum ger, at hann framvegis er á toppinum?

- Tónleikurin hjá honum er rættiliga tíðarleysur. Hetta er rock n´ roll beint út eftir landavegnum. Vit síggja í kvøld, at hann kann undirhalda 20.000 áhoyrarum á plenuni í Tivoli. Tá hann fyrst hevur víst vegin, so eru fólk við, sigur John Christoffersen.

- Nógir aðrir tónleikarar megna heilt einfalt ikki at levera vøruna, tá teir eru komnir nakað upp í árini, men so er ikki við Shakin´ Stevens. Tað eru nógv dømir um sangarar, sum hava verið eins høgt í metum sum Shakin´ Stevens, men tá teir royna at trína aftur á pallin eftir ein steðg, eru teir ikki førir fyri at framføra á sama støði, sum teir vóru vanir.